# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Tað kunnu vit so gleðast um í nakrar tímar, men heldur ikki meira*
*Sigfríður S. Clementsen, EB/Streymur*

# Olaf vann Grand Prix



*Olaf vann ein uppibornan sigur við einum øgiligum endaspurti.*

**Finalan í Grand Prix kappingin í talvi varð avgreidd um vikuskiftið í hølum Havnar Telvingarfelags. Olaf Berg vann kappingina saman við Helga D. Ziska, og sostatt gjørdist Olaf Grand Prix vinnari 2008**

TALV
*Ólavur Simonsen*
*olavur@sosialurin.fo*

Grand Prix kappingin í talvi er nú endaliga avgreidd eftir níggju drúgvar kappingar. Kappast hevur verið ymsastaðni runt um landið, har endað varð við einari finalu í høvuðsstaðnum. Finalan var skipað øðrvísi enn undanfarnu kappingar við at hava nýggju umfør, har hvør telvarin hevði 15 minuttir til talvið.

### Olaf og Helgi vunnu finaluna

Hóast seinasta kappingin var ein finala, so var tað frítt hjá øðrum at luttaka, men teirra úrslit var ikki galdandi í samlaðu støðuni. Helgi D. Ziska, ið ikki hevur luttikið í Grand Prix høpi í ár, luttók tí helst bert av áhuga. Helgi fekk tó størri mótstøðu, enn hann hevur fingið í øðrum kappingum, hann hevur telvað í Føroyum seinastu tíðina, har hann mátti av við tryggjar javnleikir. Hetta var tó nóg mikið til at vinna kappingina saman við Olafi, sum somuleiðis telvaði trý jøvn og vann seks.

### Olaf sannførandi

Olaf luttók fyri fyrstu ferð í Grand Prix kappingini í fjórðu kapping. Hetta var hansara seinasti møguleiki, um stig hansara skuldu galda í samlaðu støðuni. Longu tá vóru 18,3 stig upp til oddin, og tí var kravið av honum at vinna tað, ið vinnast kundi. Olaf gjørdi bart og vann fjórðu kapping einsamallur á fyrsta plássi. Eftir hetta vann Olaf fýra av fimm kappingum, sum gav eitt samlað úrslit á 34,3 stig, sum eru heili 5 stig framman fyri nærmasta kappinganeyta. Annað plássið fór til Ólav Simonsen, og triðja plássið fór til Torkil Nielsen.

### Undirbólkar

Samlaða kappingin var eisini býtt upp í undirbólkar, ið vóru bólkaðir eftir ratingtølunum. Hesir vóru ávíkavist 2000-1750, 1749-1500, 1499-1250 og 1249-1001. Her vístu úrslitini eina bjarta framtíð fyri Sandavágs Talvfelag, har tríggir vinnarnir vóru úr Sandavági. Teir gjørdust ávíkavist Rógvi E. Nielsen, Jónfinn Thomsen og Høgni E. Nielsen. Vinnarin í bólkinum 1249-1001 gjørdist Jóhan Hentze úr Havnar Telvingarfelag.

### Bert tvey tiltøk eftir

Eftir eitt tað virknasta kappingarárið nakrantíð, eru bert tvey tiltøk eftir. Telvað verður 2. hvítusunnudag í Pállstovu, har FM-lið finalan fyri ung fer av bakkastokki.

Kappingarárið endar við einari steypakapping 17. mai í Gjáargarið, har øll liðini fara at telva um heitið, sum Klaksvíkar Talvfelag skal verja frá 2007. Seinni verður gallakvøld, har ársini telvari og annað skal finnast.

## Dómararnir krevja revsing

Kappingarnevndin hjá FSF hevur fund í dag. Á skránni er millum annað spurningurin, um útsagnirnar hjá Bartali Eliasen eftir dystin hjá NSÍ í Runavík skulu fáa avleiðing

- Ein dómari, sum hvørki dugir at renna ella at floyta. Og sum ger sær sjálvum fyri skommum.

Tað var millum annað tað, sum Bartal Eliasen hjá ÍF hevði at siga um avrikið hjá Rúna Gaardbo, tá ÍF tapti 3-2 í Fuglafirði. Millum tað, sum Rúni tá dømdi, vóru trý brotsspørk, sum av flestu spælarunum vórðu mett meira enn ivasom. Og í øsingini um hetta fekk ÍF eisini tvey reyð kort.

Í 3-2 sendingini hjá Kringvarpinum í gjárkvøldið segði Petur Reinert, formaður í dómarafelagnum, at felagið krevur, at útsagnirnar hjá Bartali Eliasen fáa avleiðingar, og at tey hava sent bræv til FSF hesum viðvíkjandi.

**-mørk**

## Jón Rói heilt nær gullinum

Fyru fyrstu ferð nakrantíð í søguni hjá SAS-liguni eydnaðist tað ígjár Horsens at fáa stig ímóti FC Keypmannahavn. Talan gjørdist um ein heimasigur uppá 3-2 eftir hálvleiksstøðuna 0-0. FC Keypmannahavn kom annars á odda 1-0 í 54. minutti, men uppá eitt korter vendi Horsens dystinum frá 0-1 til eina 3-1 leiðslu, og tá munaði ikki nógv, at FCK minkaði um munin til 3-2 beint fyri leiklok. Venjarin hjá FCK, norðmaðurin Staale Solbakken viðurkennir, at meistaraheitið er farið, ella sum hann sigur sjálvur: - Tað er farið fyri langari tíð síðani! Staale Solbakken vil kortini ikki lasta sínum spælarum fyri ta kreppu, sum liðið er í: - Eg eri ikki argur inn á spælarnir. Eg eri ikki argur inn á nakran. Síðstu árini hava vit fingið nógv rós fyri okkara fótbóltsspæl, nú fáa vit rís. Men tað tími eg ikki at gremja meg um.

Úrslitið var fagnað norðuri í Ålborg. AaB er nú 9 stig frammanfyri FC Midtjylland, og 10 stig frammanfyri FC Keypmannahavn. 5 dystir eru eftir at spæla í SAS-liguni, og tað skal ganga nógv galið, um liðið hjá Jón Róa Jacobsen ikki gerst danskur meistari.

**-heris**

## Syhler ávegis til H71

Dimmalætting skrivar, at alt týðir á, at Danni Syhler spælir við H71 í hesum kappingarárinum.

Danni Syhler var saman við David Edvardsen og Sveini Justinussen ein av undangongu monnunum hjá StÍF í farna kappingarári. Men nú týðir alt á, at teir av skálarfjørðinum mugu verða bæði Edvardsen og Syhler fyri uttan, tá kappingin fer av bakkastokki aftur.

David Edvardsen skifti fyri mánaða síðan til Neistan, og í kvøld skrivar Dimmalætting, at Danni Syhler helst spælir við H71 í vetur. Í stuttari viðmerking sigur hann, at einans undirskriftin restar í.

**-uni**